Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum:

# Eg hevði varhugan av hesum



*Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag, harmast um uppsagnirnar, men sigur, at føroyski fiskimaðurin er robustur og nokk skal klára seg*

**200 limir í Fiskimannafelagnum missa um fáar mánaðir starvið, tá Atlantic Navigator gevst við fiskiskapi undir føroyskum flaggi. Við útlitunum her og krillinum í suðuratlantshavi, kom uppsøgnin av manningini ikki púra óvart á fiskimannafelagsformannin**

UPPSAGNIR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eg eri sera harmur um støðuna við Atlantic Navigator!

Jan Højgaard dylir ikki fyri, at tað er við serliga stórum harmi, at hann má staðfesta, at JFK nú hevur gjørt av at flagga Atlantic Navigator út úr føroyska flotanum.

Júst hetta skipið hevur havt serligan týdning fyri føroyska fiskivinnu. Hann er at rokna sum eitt skúlaskip fyri føroyskan ungdóm, og hevur í allarstørsta mun verið við til at skapa áhuga fyri fiskiskapi og fiskivinnu millum tey ungu, sigur Jan Højgaard.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum vísir eisini á, at Røkke-fíggjaða skipið hevur skapt áhuga hjá konufólki at søkja sjógvin. Tað byrjaði av álvara við Næraberg og hevur rættiliga tikið dyk á seg við Atlantic Navigator.

Fiskivinnan er okkara høvuðsvinna, og tí er tað lívsneyðugt, at áhugin fyri hesi vinnu áhaldandi verður vaktur millum unga fólkið. Og í so máta hevur Atlantic Navigator verið fyrimyndarligur, sigur Jan Højgaard.

200 limir í Fiskimannafelagnum er sjálvandi eitt munandi tal, men kortini kemur uppsøgnin av teimum ikki púra óvæntað á fiskimannafelagsformannin.

Eg havi lisið í útlendskum bløðum um møguleikarnar við krilli í suðuratlantshøvum. So spurningurin er, um tað bara er fiskimálaráðharrin, sum rekur skipið av landinum, ella um ikki eisini útlendski kapitalurin søkir hagar, ið møguleikarnir eru størstir, sigur Jan Højgaard.

### Føroyskir fiskimenn robustir

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag sigur, at vit enn sum áður eru sera tengd at fiskivinnuni samfelagsliga. Og hann heldur, at tað er í fínasta lagi, at ungdómurin søkir sær útbúgving innan eitt nú telduheimin. Men Jan Højgaard vísir eisini á, at tað er alneyðugt við tilgongd frá teimum ungu til fiskivinnuna.

Vit hava brúk fyri ungdómi innan øll starvsøki, men vit mugu eisini síggja í eyguni, at vit ikki fara at megna at kappast á lønarmarknaðinum móti lágløntum teldusnillingum úr Asia. Tí mugu vit áhaldandi dúva upp á at skapa áhuga millum ungdómin fyri fiskivinnuni, sigur Jan Højgaard.

Hann vísir á, at hann ætlar sær at fara at tosa við manningina, tá uppsagnarfreistin nærkast. Innan onnur starvsøki verður tosað hart og breitt um sálarfrøðingahjálp, tá fólk missa arbeiði. Men fiskimaðurin verður gloymdur.

Í 1992 varð nógv tosað um sálarfrøðiliga hjálp til einar 10 sjúkrasystrar, ið mistu starvið orsakað av kreppuni. Men at 1200 fiskimenn samstundis mistu sítt livibreyð, tók eingin upp á tunguna, sigur Jan. Fiskimannafelagsformaðurin væntar og vónar tó, at nýtt skip kemur í flotan fyri Atlantic Navigator, sum harvið kann hjálpa um støðuna hjá í hvussu er einum parti av teimum, sum nú missa starvið. Men hóast tað ikki hendur, er Jan Højgaard ikki so bangin fyri manningini.

Føroyskir fiskimenn er eitt robust fólkaslag, sum ikki bukkar undir fyri tað fyrsta. Eg fari tí at bíða tey ikki missa mótið, men halda flaggið høgt og stríðast fyri føðilandið, sigur Jan Højgaard, formaður í Føroya Fiskimannafelag.

---

Tummas Justinussen, reiðari:

# Bjørn ein skandala fyri føroyska fiskivinnu

**Er ætlanin at revsa teir, ið vinna eitt oyra burtur úr fiskivinnuni, átti hetta at verið gjørt við eini broyting í skattalógini. Eg síggi als onga meining í teimum útmeldingum, sum koma frá fiskimálaráðharranum um, at taka fiskiloyvini frá skipunum, sjálvt um tað so ikki verður fyrr enn um 10 ár. Tí hvør banki vil fíggja okkara fiskivinnu við teimum treytum, sigur Tummas Justinussen, reiðari og vinnulívsmaður**



*Við so ótryggum karmum, sum Bjørn Kalsø leggur upp til, fer eingin banki at fíggja føroyska fiskivinnu, sigur Tummas Justinussen, reiðariw*

FISKIVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Málið um Atlantic Navigator hevur skapt eina ávísa røring innan føroysku fiskivinnuna. Nógvir reiðarar síggja hetta sum bara fyrsta dømi um eina størri útflagging av okkara fiskiflota. Og ein teirra, sum er ógvuliga bersøgin um støðuna, er Tummas Justinussen, reiðari og vinnulívsmaður.

- Eg síggi als onga meining í tí, sum verður ført fram av fiskimálaráðharranum. Er alt rumblið skapt av tí eina døminum, har Ejler Jacobsen fekk nakað av vinningi fyri sítt lívsverk, so er hetta avgjørt ikki rætti mátin at tackla tann trupulleikan, sigur Tummas Justinussen.

Hann vísir á, at skulu forðingar setast fyri vinningi av sølu av eitt nú fiskiskipum, so skulu hesar gerast við broytingum í skattaskipanini og ikki við at leggja fiskiflotan í skeljasorar.

- Um Ejler fyri 50 árum síðani bygdi eini hús fyri dýrar dómar og seldi tey aftur í fjør, so hevði vinningurin verið munandi størri enn við Krúnborg. Men tá hevði eingin latið við seg koma á nakran hátt. Tá so talan er um eitt skip er alt á gosi, sigur Tummas við Sosialin.

Ótryggleikin, sum valdar í føroysku fiskivinnuni við útmeldingunum um, at skip og reiðaríir um 10 ár mugu keypa fiskirættindini á hvørjum ári, og um tilfeingisgjald ger, at útlendskir íleggjarar søkja aðrar leiðir. Og útlendsk bankafólk rysta á høvdinum at ruðulleikanum, ið valdar í Føroyum á fiskivinnuøkinum.

### Eingin vil fíggja

Tummas Justinussen dylir ikki fyri, at tær útmeldingar, sum koma frá fiskimálaráðharranum køva allan áhuga og virkisvilja hjá monnum at fáast við fiskivinnu.

Kapitalurin fer har, ið møguleikarnir eru bestir. Og tá karmarnir í føroysku fiskivinnuni eru so óstøðugir og ótryggir, er tað bara náttúrligt, at íleggjarar søkja aðrar leiðir, tí teir eru sjálvandi áhugaðir í at forvinna pening, sigur reiðarin.

Men ikki bara útlendskur kapitalur flýggjar úr vinnuni. Eisini føroyskir reiðarar umhugsa heilt náttúrligt at søkja aðrar vegir og aðrar vinnugreinar. So er politiska ynski kaos, so er hetta rætta leiðin at ganga, sigur Tummas Justinussen.

Eingin skal tó halda, at hann er ímóti allar stýring innan vinnuna. Tí Tummas heldur tað vera í lagi, at vart verður fyri, at útlendski kapitalurin yvirtekur føroysku fiskivinnuna. Heldur ikki metir hann tað vera nakað forgjørt í øðrum avmarkingum í fiskidagaskipanini. Men harfrá og til at gera av, at um 10 ár missa øll skip síni fiskirættindi fyri síðani á hvørjum ári at kappast um at keypa tey aftur, er sum at leggja eina bumbu undir vinnuna.

Tað er í lagi at fylgja ávísum treytum. Sum til dømis at føroyingar skulu eiga 67% av partapeninginum, at tú skal nýta í minsta lagi 80% av fiskidøgunum í einum 5 ára skeiði og at tú skal landa ávísa nøgd um føroyska uppboðssølu. Men við teimum ætlanum, fiskimálaráðharrin leggur fyri dagin nú, eigur føroysk fiskivinna onga framtíð.

Eg skal ikki skava útyvir, at eisini vit týðum hava forvunnið pengar í vinnuni, men 99% av hesum eru endaðir aftur í vinnuni so ella so. Og hvør banki vil fíggja eina vinnu, sum hevur so ótryggar karmar at virka undir? Við teimum útmeldingum, sum koma frá fiskimálaráðharranum er einki at taka seg aftur í, at Bjørn Kalsø er ein skandala fyri føroysku fiskivinnuna, sigur Tummas Justinussen.